**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag**

## Aðalfundur

felagsins verður

**mánadagin 20. mars.**

Skrá sambært lógum felagsins.

Tíð og stað verður lýst seinni.

**Nevndin**



**Landssjúkrahúsið**
**FO-100 Tórshavn**

## Sjúkrasystir

Eitt starv sum sjúkrasystir á skurðdeildini á Landssjúkrahúsinum er leyst til setan skjótast gjørligt og fram til 28. februar 2001. Starvið er eitt fulltíðarstarv.

Umsøkjarin skal hava kunnleika til sjúkrasystraarbeiði á skurðdeild.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Nainu Túgvustein, deildarsjúkrasystir, tlf. 313540 lokal 138.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknarfreist: 17. mars 2000, kl. 14.00.






Bestilnr. 73 1587

Navn

Adresse

Postnr.: By.:

Fødselsdato Underskrift

**Ja tak,** Jeg vil gerne have den gratis video, derudover modtager jeg det nye erotikkatalog i A5 **gratis.** Det eneste jeg betaler er ekspeditionsgebyret på 51,- Send ikke rede penge - men vedlæg check eller indbetal på giro 083-3371 **Kun for voksne.**

Send kuponen til: ORION Postordre • Postbox 785 • 2730 Herlev



## Aðalfundur

felagsins verður í VB-húsinum tórsdagin 16. mars 2000 kl. 19.00.

Skrá sambært grein 6 í viðtøkum felagsins.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á aðalfundinum, eiga skrivliga at verða starvsnevndini í hendi í minsta lagi 8 dagar frammanundan.

1905 VB **Vágs Bóltfelag**



# Ársaðalfundur

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Føroya Banka

**hósdagin 30. mars 2000 kl. 17.00**

á Hotel Føroyum, Tórshavn, við hesi dagsskrá:

1. Frágreiðing nevndarinnar um virksemi bankans í farna ári.
2. Framløga av ársroknskapi við grannskoðaraátekning til góðkenningar og ársfrágreiðing.
3. Avgerð um nýtslu av avlopi sambært góðkenda ársroknskapin.
4. Val av nevndarlimum.
5. Val av grannskoðarum.
6. Uppskot um, at nevndin fær heimild til innan endan av mars 2001 at lata bankan ognast upp til 1 pst. av partapeningi bankans fyri ein kurs, sum ikki kann víkja frá seinasta almannakunngjørda innara virðinum við meira enn 10 pst.
7. Ymiskt.

Grannskoðaði ársroknskapurin og ársfrágreiðingin liggja frammi á skrivstovu bankans í Húsagøtu 3.

Atgongumerki til aðalfundin verða útflýggjað á deildum bankans í seinasta lagi mánadagin tann 27. mars 2000.

Tórshavn, tann 2. mars 2000

NEVNDIN

FØROYA BANKI





**Brenniovnur av merkinum Alta til sølu**

Ovnurin er spildurnýggjur og er bert brúktur eina ferð til roynd

***Skorsteinssóparin***
***Hvalvík • Tel. 422456***


**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin tann 23. mars. 2000 kl. 10.00**
verður á dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 618, Tvøroyri, á Sevmýri, (AS 5/2000).**

Ognin er í trimum hæddum, stovuhædd: 1 stova, kamar, køkur, lítil gongd, wc, trappa uppá loft, 58 m². Loftshædd: 3 kømur, wc v/ kari. Kjallarin: moldgólv. Grundøki er 233 m².

Húsini eru av timbri á betonggrund, klædd við plastikki og takt við aluman.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Julionnu Klett, advokati, Bringsnagøta 15, 100 Tórshavn, tlf. 311744 (j.nr. 88345),** sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Søluuppgerð kann fáast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 24. feb. 2000*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 296, **Sp/f Vestís, 380 Sørvágur.**

**Vi›tøkur broyttar:**
23.11.1999.
**Kapitalur:**
Lækking vi› kr. 336.600,00 til kr. 3.400,00 til rindan av halli.
Hækking vi› kr. 315.000.00 til kr. 318.400,00
Inngjaldingarháttur:
Kontant kr. 315.000,00 til kurs 100.
**Nevnd:**
Innkomin í nevndina: Poul Arni Jacobsen, 380 Sørvágur.

Skráseting Føroya tann 2. mars 2000

Kristin Balle


**Skorsteins-sóparin**

**er við til at halda umhvørvið reint**

**Jimex Brenniovnar**
**Isokern Skorsteinsbjálving**
**Isokern Skorsteinselementir**
**Lúkur - Fuglaristir**
**Ventilar - Roykhattar**

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass



**Føroya største úrval av**
**PAKKITILFARI**
**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:

* **Plastbakkar**
* **Pakkibond, tape**
* **Merkir, etikettir**
* **Knívar**
* **Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.**
* **Ymisk tól til ídnaðin**
* **Reingerðisevnir**
* **Tilsetningsevnir**
* **Plattar**
* **Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari**

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**

*Staravegur 5, P.O. Box 171*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*



***Vaskivognar Kantinuvognar***



***Vit hava eitt stórt og gott úrval av vaski- og kantinuvognum***

P/f Thomas Dam á Hálsi Wholesale
Heykavegur 1 • 100 Tórshavn • Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820




e-mail: jakup@sosialurin.fo

**Ítróttur**

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

# Søguligur Neistasigur

*Eftir at hava havt greiða yvirvág allan fyrra hálvleik, mistu kyndilsleikararnir so at siga alt á gólvið seinasta hálva tíman, og sostatt kundi Neistin skriva felagssøgu, nú teir hava vunnið allar landskappingardystirnar á grannunum hetta kappingarárið*



*Fyrsta hálva tíman hevði kyndilsverjan sera gott tak á Áka Olsen, men seinna umfarið var hann ikki til at steðga*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

Kyndil-Neistin 23-29 (16-11)

Seinasta lokaluppgerðin millum havnarliðini bæði varð leikt mikukvøldið, og fyri báðar partar var hetta samstundis eitt slag av lagnudysti.

Fyri Kyndil var hetta absolutt seinasta útkall hjá teimum, um teir skuldu halda lív í vónunum um eina endastøðu í toppinum, meðan tað fyri Neistan var av avgerðandi týdnigni, at teir fingu tvey stig burtur úr dystinum, um teir framhaldandi skuldu fylgja við hinum báðum oddaliðunum, StÍF og VÍF.

Teir tríggir dystirnir, sum liðini higartil høvdu leikt í landskappingini hetta kappingarárið, vóru allir endaðir við neistasigri, um enn onkrir teirra vóru sera teprir. Hinvegin vann Kyndil steypakappingina við sigri á júst Neistanum, so lagt var av sonnum um til ein sera spennandi dyst.

### Kyndil sat á øllum

Fyrstu løtuna var tó ikki nógv, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakra spennandi uppgerð. Kyndil var snøgt sagt nógv tað betra liðið, og komst hetta serliga av, at teir løgdu so nógv fyri í verjupartinum.

Serliga í høgra verjuborði var hetta sjónligt, við tað at teir vardu somikið offensivt, at Áki Olsen so at siga ongan møguleika hevði at koma til skot.

Í hinum verjuborðinum royndi Heini Joensen seg fleiri ferðir, men aloftast vóru kyndlarnir beinan vegin á honum, soleiðis at hann varð órógvaður, og flestu skotroyndirnar endaðu eisini omanfyri ella við síðuna av málinum, og tá bólturin so endiliga fekk kós móti málinum, megnaði Lars Winther aloftast at verja fyri.

Ein av høvuðsorsøkunum til, at tað eydnaðist somikið væl hjá Kyndli at verja somikið offensivt tóktist eisini vera, at Neistaliðið so at siga einki strikuspæl hevur, soleiðis at bólturin ongantíð varð spældur inn um verjuna.

Við tað at verjupartinum hjá Kyndli eydnaðist somikið væl, hendi tað seg eisini meira enn tí einu ferðina, at teir við fúkandi ferð kundu fara í kontra álop, og so at siga ótarnaðir seta bóltin í málið.

Petur Magnusson í neistamálinum man hava bjargað teimum mong stigini í ár, men tað lítla korterið, sum hann var á vøllinum, fekk hann so at siga ikki fatur í nøkrum skoti, og tískil gjørdi neistavenjarin rættuliga skjótt av at royna Boga Hendriksen í staðin.

Hetta byrjaði beinanvegin at gera mun, tí Bogi framdi fleiri góðar bjargingar restina av hálvleikinum, men einsamallur maður kundi hann ikki gera tað stóra við kyndilyvirvágna. Tó so, heilt einsamallur var hann ikki, tí móti endanum av hálvleikinum lá brádliga betur fyri hjá Heina, soleiðis at munurin í hálvleikinum »bert« var trý mál.

### Hamskift í seinna hálvleiki

Tá liðini komu á vøllin til seinna hálvleik, var alt brádliga viðvent. Neistin, og serliga Áki Olsen, løgdu fyri sum eitt óløgi, og Lars, sum hevði staðið ein sera góðan fyrra hálvleik, kundi millum lítið og einki gera, tá kanónskotini vórðu send móti honum.

Fýra mál á rað syrgdu fyri, at munurin minkaði niður í eitt mál, men brádliga fór Kyndil aftur at gera um seg.

Tað var tó sum um, at teir als ikki fingu sama glið á spæli, sum teir høvdu í fyrra. Leikferðin hjá Kyndli var eisini nógv lægri seinna hálvleikin, enn hon hevði verið í fyrra, og harumframt var verjan eisini nógv flatari.

Eftir mínum tykki, var hetta dekan ov tíðliga at taka ferðina av spælinum, tí aloftast er tað soleiðis, at um tú fyrst hevur sett ferðina niður, er sera trupult at fáa hana nóg høga aftur, og soleiðis var eisini ferð. Hvørt tað var spæliætlanin, sum eydnaðist, ella orkan, ið gekk undan, skal ikki verða sagt her, men í øllum førum er tað ein sannroynd, at hetta kostaði Kyndli stigini mikudagin.

Neistin helt nevnliga á fram við ágangandi álopsspælinum, og eftir at Kyndil hevði skorað til 19-17, gingu tólv minuttir, til bólturin aftur lá í neistamálinum. Hetta var tó ikki bert orsakað av vánligum kyndilsspæli, tí umframt at neistaverjan stóð seg betur nú, leikti Bogi einki minni enn ein óhugnaliga góðan seinna hálvleik.

Líkamikið hvat kyndilsleikararnir gjørdu, so megnaði hann onkursvegna at verja fyri, tá skot vórðu send móti honum.

Í eini seinastu roynd at venda dystinum, royndi Kyndil at mansverja Áka og Heina, men hesu ferð eydnaðist royndin ikki. Aldursforsetin, Kári Mortensen, tók ístaðin yvir, og av seinastu seks neistamálunum átti Kári tey fýra.

Sostatt gjørdist dysturin mikukvøldið eitt satt antiklimaks hjá Kyndli, sæð í mun til steypafinaluna. Tað ferðina vóru tað teir, sum kundu fegnast um steyp og sigur, men hesu ferð máttu teir lata sær lynda, at tað vóru neistaleikararnir, sum høvdu smílið frammi, tá dysturin var lokin.

### Kyndil úti

Eftir dystin tykist tað vera heilt víst, at Kyndil hevur mist allar møguleikar fyri heiðursmerkjum hetta kappingarárið. Seks stig eru nú upp til triðja plássið, og hetta verður helst møtumikið at vinna inn aftur í teimum fýra dystunum, sum eru eftir at spæla.

Neistin betraði hinvegin um støðu sína í oddinum, har enn eru teir tvey stig aftan fyri vestmenningar, men hinvegin hava teir tveir dystir til góðar.

Eisini fingu teir víst, at breiddin í hópinum er nóg stór, til at teir kunnu vera týðandi leikarar fyri uttan. Áki Mørk, sum hevur leikt sera væl seinastu dystirnar, var burturstaddur hendan dystin, men maður kemur í mans stað verður sagt, og soleiðis varð eisini hesu ferð. Eftir at Elmar Ósá hevði roynt seg á veinginum allan fyrra hálvleik, kom Helgi Justinussen inn í seinna, og unglingurin stóð seg sera væl, og millum annað varð ikki fyrr enn eftir at hann kom inn, at nakrar yvirgongdir vóru at síggja á neistaliðnum.

Eisini Ræni Slættanes gjørdi um seg, eftir at hann varð settur á vøllin, og spurningurin er helst, um hann ikki átti at fingið meira spælitíð í álopspartinum, har Neistin alt árið hevur staðið seg illa í strikuspælinum.

Ivasamt man tó vera, um Páll Poulsen torir at blaka hesar ungu óroyndu leikarar fyri leyvurnar, nú seinastu avgerandi dystirnir standa fyri framman. Komandi fýra dystirnar, skal Neistin royna seg á útivølli móti bæði VÍF og StÍF. Ikki tí, tað skal Kyndil eisini, so seinasta orðið frá teimum er helst ikki sagt enn, hóast teir neyvan skulu gera sær nakrar vónir um heiðursmerki á hesum sinni.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Jacob Jónsson 5, Bjarni Wardum 5, Uni Wardum 4, Rúni Poulsen 3, Regin Petersen 3, Hans Áki Dahl Christiansen 2, Janus Einar Sørensen 1
Neistin: Áki Olsen 11 (2), Kári Mortensen 6, Heini Joensen 5, Ræni Slættanes 3, Jákup Sverri Kass 2, Elmar Ósá 1, Finnur Hansson 1
**Brotskøst:**
Neistin 4
**Úvísingar:**
Kyndil 4, Neistin 1
**Dómarar úr Tjaldur:**
Kári Hansen og Dánjal Hansen

